## Lítið álit á politikarum

Týskarar hava ikki serliga gott álit á teimum politikarunum, sum sita í landsins leiðslu. Tað er í hvussu er niðurstøðan í einari nýggjari kanning, sum vísir, at veljararnir eru misnøgdir við tey tiltøk, sum stjórnin hevur framt í sambandi við fíggjarkreppuna. Misnøgdin er so stór, at heili 70 prosent av teimum spurdu siga seg ikki hava álit á teimum leiðandi politikarunum, og so lítið álit hevur eingin týsk stjórn havt síðani seinna heimsbardaga, skrivar DPA. Næstan líka mong siga seg hava mist álitið á landsins fremstu vinnulívsmonnum.



## Nógv minni lomvigi

Grønlendski stovnurin av póllomviga er minkaður sera nógv tey seinastu 50 árini, men granskarar siga seg kortini hava vónir um, at vend fer at koma í. Ritenbenk við Diskovíkina er tað einasta staðið, har póllomvigi eigur, og sambært granskarum hjá Danmarks Miljøundersøgelser er stovnurin har minkaður 90 prosent tey seinastu 50 árini. Granskararnir siga, at grønlendingar hava veitt ov nógvan lomviga um várið og summarið. Tað er bannað nú, og tí vænta granskararnir, at stovnurin fer at menna seg aftur, sigur KNR.

# Tinglimur niðurger gransking í gøtunøvnum

**Sovorðið »skítbýtt tvætl« kallar Heini O. Heinensen tað at játta pening til at granska í føroyskum gøtunøvnum. - Harmiligt at ein politikari niðurger eina ítøkiliga granskingarætlan, heldur stjórin í Granskingarráðunm**

GRANSKING

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*- Tað er ikki uppgávan hjá politikararum at meta um, hvørt ein granskingarverkætlan er verd at stuðla. Tað hava vit granskingarnevndina til, sigur Annika Sølvará, stjóri í Granskingarráðnum*



*Heini O. Heinsen, tinglimur, heldur tað vera burturvið at játta út við hálva aðru millión til at granska í føroyskum gøtunøvnum*





*Veganøvn eru gjørd sambært lógini, og tí mátti ikki verið neyðugt at granska í teimum, heldur Heini O. Heinesen*

Varð tað til Heina O. Heinesen, løgtingslim, hevði granskingarverkætlanin í føroyskum veganøvnum hjá málfrøðinginum Kristin Magnussen neyvan fingið eitt oyra á fíggjarlógini, sum tíðirnar eru í løtuni.

Undir 3. viðgerð av fíggjarlógini beint fyri jól, legði tinglimurin fyri Tjóveldi nevniliga ikki fingrarnar ímillum, tá hann av tingsins røðarapalli metti um týdningin av eini slíkari gransking.

- »sovorðið skítbýtt tvætl«. Veganøvn í Føroyum eru gjørd sambært lógini, sum er galdandi. Tí eru veganøvn sum tey eru, var niðurstøðan hjá Heina O. Heinsen, sum tískil helt, at slíkum mátti verið óneyðugt at granska í.

Samstundis róði Heini O. Heinesen fram undir, at slík gransking minti mest um okkurt slag av »beskæftigelsesterapi«. At játta út við hálva aðru millión krónur til slíkt er í øllum førum heilt burturvið í hungurstíðum sambært løgtingsmanninum.

### Ikki hansara borð

Stjórin á Granskingarráðnum, Annika Sølvará, hoyrdi eisini útsøgnirnar hjá Heina O. Heinesen hendan dagin, og eins og mong onnur undrar hon seg yvir bersøgna orðalagið hjá tingmanninum.

- Eg haldi tað vera harmiligt, at ein tinglimur stendur og niðurger eina ítøkiliga verkætlan uppá handan mátan frá tingsins røðarapalli. Sum øll onnur kann Heini O. Heinesen sjálvandi hava sína meining um slíka gransking, men tað ikki hansara borð at meta um, hvørt verkætlanin er verd at stuðla fíggjarliga ella ikki. Tað hava vit fakfólk til, minnir Annika Sølvará og sipar til granskingarnevndina.

Hon vísir á, at við granskingarnevndini hava politikarar við lóg tryggjað sær, at metingar av umsóknum um pening til gransking eru lagdar út til ein fakligan mynduleika. Nevndin er sett saman av sjey føroyskum fakfólkum, umframt at tað sum oftast eisini eru tveir eksternir serfrøðingar á viðkomandi øki við í einstøku metingunum.

- Granskingarverkætlanin í gøtunøvnum hevur sostatt verið gjøgnum eina sera neyva og kompetenta fakliga meting, og eg kann standa 100 prosent inni fyri, at hon er verd at stuðla, sigur Annika Sølvará.

### Kann lækka játtanina

Fyribils má hon bara ásanna, at gøtunøvn eftir øllum at døma ikki er eitt øki, sum Heini O. Heinesen heldur er vert at granska í.

- Um hann ikki er nøgdur við mátan, játtanin til gransking verður brúkt, kann Heini O. Heinsen sum politikari royna at lækka játtanina, um tað er tað, hann vil, sigur stjórin í granskingarráðnum.

Hinvegin kann tað eisini hugsast, at útsøgnirnar hjá tingmanninum botna í manglandi vitan um, hvat ein slík gransking í gøtunøvnum snýr seg um, heldur hon. Tí hóast Granskingarráðið 14. hvønn dag sendir tíðindaskriv út um aktuellar granskingarverkætlanir, kann kunningin nokk altíð gerast betri, viðgongur Annika Sølvará.

- Tað liggur altíð ein avbjóðing í røkka tvørtur um gjónna millum fakliga granskingarumhvørvið og tey, sum ikki eru partur av slíkum arbeiði. Hetta arbeiða vit alsamt við, tí slík kunning er sjálvandi ein av okkara týðandi skyldum, sigur stjórin í granskingarráðnum.

Á heimasíðuni hjá ráðnum ber altíð til at finna upplýsingar um einstøku gr anskingarverkætlaninar. Eisini um granskingina í gøtunøvnum, sum millum annað umfatar eina greining av føroyska gøtunavnatilfarinum og teimum tilgongdum, sum hava ført til navnagevingina av veganetinum í føroyskum býum og bygdum.

# Guttormur Sørensen bleiv Ársins Rósa

**Tollaksmessudag heiðraðu Klaksvíkingar rennaran og íðkaran Guttorm Sørensen við Ársins Rósu 2009**

ÁRSINS RÓSA 2009

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

»Hann er ein eldsál, tá ið tað snýr seg um at fáa fólk í gongd og at fáa fólk at kenna seg væl, sum koma til venjing«, varð sagt í einum av mongu uppskotunum til at lata ítróttarmanninum Guttormi Sørensen Ársins rósu.

### At geva

Tað var Gunvá við Keldu, borgarstjóri, sum í sambandi við árliga tiltaki »Jólaskipið«, lat eldhugaða ítróttarmanninum Ársins rósu tollaksmessudag. Í røðuni tók hon saman um nakrar av viðmerkingunum hjá teimum mongu, sum hildu, at júst Guttormur Sørensen hevði uppiborið heiðurin í ár. Millum annað varð sagt at:

- Hann hevur vunnið ein hóp av heiðursmerkjum innan renning
- Hann hevur seinastu árini verið ein sterkur stuðul undir arbeiðnum hjá Ítróttafelagnum Treysti
- Hann hevur verið við til at eggja øðrum norðoyingum og føroyingum til at ”renna fyri heilsuni”
- Hann hevur gjørt sítt til, at átakið ”Renn fyri Heilsuni” er eydnast sera væl her í lokalsamfelagnum
- Hann hevur – saman við øðrum, sjálvandi – skipað fyri heilsurenning hvønn leygardag alt summarið
- Hann ger veruliga sítt til, at vit kunnu kalla Klaksvík ein rørslubý
- Hann hevur – saman við øðrum góðum fólki – skipað fyri Kalsoyarrenningini, sum í ár taldi umleið 100 rennarar úr øllum landinum.

Borgarstjórin legði afturat, at um vit skulu finna ein felagsnevnara fyri allar hesar ársins rósur, so mugu vit brúka orð sum næstrakærleiki, hjálpsemi, samhugi, ídni og virkisfýsni. Alt dygdir, sum vit øll eiga og kunnu brúka til frama fyri onnur – hvør í sínum lagi og eftir besta førimuni.

- Men tað kann sigast enn styttri, í einum sagnorði: at geva, og júst hetta er slagorðið hjá tiltakinum Ársins Rósa. Á vasanum, sum eg nú skjótt skal handa, stendur eitt skriftbrot, har Hann, sum vit minnast nú á jólum, verður siteraður, at ”sælari er at geva enn at fáa”.



*Ítróttarmaðurin Guttormur Sørensen fær handað Ársins Rósu 2009 frá borgarstjóranum í Klaksvík, Gunvá við Keldu*